# RÆTT KLØDD TIL ARBEIÐIS

SKJÚRTA, TROYGGJA, BLUS ELLA TOPPUR? TÁ TÚ STENDUR FRAMMANFYRI **KLÆÐNASKÁPINUM** UM MORGUNIN ER TAÐ NÓGV YMISKT, IÐ AVGER HVAT TÚ VELUR AT **LATA** TEG Í. TÍTT STARV OG TÆR **KLÆDNAREGLUR**, IÐ ERU HAR, STÝRA NÓGV. VIT HAVA TOSAÐ VIÐ NAKRAR FYRITØKUR UM, HVUSSU TEY VILJA, AT TEIRRA **STARVSFÓLK** SKULU LATA SEG Í.

**LAGT TIL RÆTTIS:** Inna Törnroos
**MYNDIR:** Álvur Haraldsen og Jens Kristian Vang



## – Eg vil vera væl ílatin tá eg komi inn í stovuna hjá fólki

### Kringvarpið

Fýra kvøld um vikuna koma Jónsigurd Johannesen og Sigrún Brend inn í stovuna hjá flestu føroyingum. Tey bæði eru tá smurd og klædd av stylistinum Ingibjørg Jacobsen.

Jónsigurd Johannesen sær nøkulunda líka út kvøld aftaná kvøld. Hann er í skjúrtu, einlittum ella stríputum slipsi og klædningsjakka.

Sigrún harafturímóti er í ymiskum klæðum hvørt kvøld. Oftani er hon í sterkum litum, eftirsum tað er tað hon passar best í.

Ingibjørg keypur og lænur øll klæði til vertirnar í Kringvarpinum.

– Mannfólkini kunnu verða í tí sama fleiri ferðir, so til teir keypi eg. Men til Sigrún má eg lána klæði eftirsum hon ikki kann vera í tí sama, tí tá koma viðmerkingar um tað, sigur Ingibjørg Jacobsen.



*Jónsigurd Johannesen er altíð í klædningi tá Dagur&Vika er á skránni.*

### Konservativur stílur

Ingibjørg ger tað mesta í samráð við vertirnar, tí klæðini mugu passa til persónin. Stílurin skal helst vera eitt sindur konservativur, men gjarna eitt sindur smartur.

– Klæðini skulu ikki órógva tíðindini. Tey skulu vera neutral, sigur hon.

Um tey sita illani hugsa fólk meira um tað, enn hvat verturin sigur.

Stórar smúkkur og blusir, ið eru ov niðurringaðar, eru bannaðar.

### Aftur í cowboybuksirnar

Munur er eisini á hvørji tíðindi persónurin lesur. Til ítróttartíðindi ber til at vera í troyggju ella skjúrtu við slipsi. Til vanligu tíðindini skal tað vera klædningur, skjúrta og slips.

Jónsigurd Johannesen sigur sjálvur, at hann vil vera væl ílatin tá hann kemur inn í stovuna hjá fólki, men at hann vanliga ikki gongur so fínt ílatin.

– Tá sendingin er liðug fari eg aftur í mínar vanligu cowboybuksir og troyggju, sigur hann.